# Pál til Danmarkar at kappast

Pál Joensen úr svimjufelagnum í Suðuroy, SuSvim, fer um vikuskiftið at luttaka í kapping í Danmark. Pál fer at luttaka við Aalborg Svømmeklub, og kappingin um viðkuskiftið er (DMH.) Danmarks Meistaraskapi fyri lið. Pál skal taka lut í 200, 400, og 1500m frí, 200m firvald, og 4x100, 4x200m frí liðkappingunum. Suðuroyar Svimjifelag samstarvar við Aalborg Svømmeklub. Fyrr í ár vóru Danjal Martin Hofgaard og Pál Joensen við felagnum á venjingarlegu á Tenerife. Kappingin er samstundis fyrireiking hjá Pál uppundir HM ið verður í aprílmánaði.



# Claus vil halda fram í Blackpool

Claus Bech Jørgensen, sum hevur spælt í enskum fótbólti síðani 1999, hevur havt eitt gott kappingarár við Blackpool. Sáttmálaskeið hansara tó verður liðugt í summar, men Claus Bech Jørgensen vónar at kunna leingja sáttmálan. – Eg vil heilt víst halda fram her í Blackpool. Ein kennir seg sum ein veruligan part av heildini. Vinarlagið og stemningurin í felagnum er framúr, og tað er ikki altíð, at grasið er grønari hinumegin. Hetta sigur Claus Bech Jørgensen við lokala blaðið The Blackpool Gazette. Blaðið heldur, at Claus Bech Jørgensen spælir betri enn nakrantíð áður, og at venjarin Simon Grayson eigur avgjørt at skriva undir nýggjan sáttmála við Claus.



*Kvinnuunglingarnir hjá TB fegnast um sigurin á KÍF*



*Otto Leo Gram, ið arbeiðir aktivt við flogbóltinum á Tvøroyri, fegnaðist millum annað um mongu áskoðararnar, sum komnir vóru til dystin. Hann staðfesti eisini, at talan var um eitt rímmar tiltak, sum átti at verið afturvendandi á hvørjum ári*

var ikki í iva, tá vit spurdu hann um hvussu tiltakið var eydnast.

– Eitt rímmar tiltak, ið heilt avgjørt eigur at vera eitt afturvendandi tiltak. Hetta er ein meira virðuligur endi á kappingarárið, og á hendan hátt kann man vera við til at hækka støðið eitt vet afturat, sigur Otto Leo Gram, ið eisini fegnast yvir mongu áskoðararnar og hjálpsomu foreldrini, ið altíð eru fús at geva eina hjálpandi hond, tá á stendur.



*Vinnararnir hjá kvinnuunglingunum hjá TB: Katrin Petersen, Manja Johansen, Elin Holm, Barbara Holm, Jonvør Joensen, Gunnhildur Bech, Halla Potts, Anna Katrina Mortensen, Marin í Dali og Marie Rasmussen*



*Gentur 14 ár hjá TB vunnu sín dyst sannførandi á Fleyr. Emma Suriphon, Súsanna Mortensen, Bára Jacobsen, Gunnvør Joensen, Rannvá í Heiðunum, Barbara Hovgaard, Elisabeth Bærendsen, Sirið Magnussen og Mirjam Christiansen mannaðu TB-liðið*



*Mansunglingarnir hjá SÍ vunnu finaluna móti Fleyr, og vóru teir sum mannaðu liðið har vesturi frá hesir: Filip Gram, Finn Ingi Falkvard, Emil Mikkelsen, Brandur Heinason, Martin Mikkelsen, Jónsvein T. Tomassen og Sonni Zachariasen*